Magnus Magnussen, SSL:

# Til Smyril í Spania

**Í august fer Magnus Magnussen, tekniskur leiðari á Strandferðsluni, til Spania. Øll familjan fer við, men hetta er tó í arbeiðsørindum, tí Magnus skal standa fyri eftirlitinum av bygginini av nýggja Smyrli niðri í Cadiz**

FLYTING
*Ingrid Bjarnastein*

Tekniski leiðarin á Strandferðsluni, Magnus Magnussen, fer í august mánaði til Cadiz í Spania. Cadiz liggur í suður-vestur Spania, umleið 150 kilometrar norðanfyri Gibraltar.

Sjálvt um hetta kann ljóða eksotiskt og spennandi, so er tað ongin stuttleikatúrur, sum er á skránni hjá tekniska leiðaranum. Magnus Magnussen fer nevniliga niður í arbeiðsørindum. Nýggi Smyril verður bygdur í Cadiz í Spania, og skal Magnus har standa fyri eftirlitinum av bygginini.

– Vit hava gjørt ein sáttmála, og í honum stendur nógv ymiskt, sum skal gerast. Eg skal so syrgja fyri, at alt tað verður gjørt, greiðir Magnus Magnussen frá.

Øll familjan fer niður við. Tríggir synir, sum eru 12, 8 og fimm ára gamlir, og konan skal eisini við. Dreingirnir skulu ganga á einum altjóða skúla.

– Vit skulu verða burtur í meira enn eitt ár. Smyril skal verða liðugur í oktober 2003, og ætlanin er, at sigla uppaftur við honum til Føroya tá. Í øllum førum eg, sigur tekniski leiðarin.



*Magnus Magnussen, tekniskur leiðari hjá Strandferðsluni, skal við familjuni niður til Spania í gott ár. Har skal Magnus taka sær av eftirlitinum við bygginini av nýggja Smyrli*

**Læra spanskt**

Magnus Magnussen dylir ikki fyri, at hann tekur ferðina sum eina risa avbjóðing.

– Tað er tað. Bæði fakliga og menniskjasliga. At seta seg inn í eina aðra mentan og koma at kenna eitt annað fólkaslag. Tað verður avgjørt sera spennandi, sigur Magnus, sum enn ikki hevur lært seg spanskt, men ivast ikki í, at tað fer at koma skjótt aftaná tey eru komin uppá pláss.

– Tú skalt bara seta teg inn í tað, so kemur tað av sær sjálvum. Eg giti heldur ikki, at spanskt er so ræðuliga ringt at læra.

Men tað verður avgjørt neyðugt at læra málið. Tað er teknsiki leiðarin ikki í iva um.

– Leiðararnir á verksmiðjuni duga uttan iva enskt, men so longur og longur niður tú kemur, so vænti eg ikki, at teir arbeiðsmenninir duga enskt. Og tí er tað týdningarmikið, at eg læri málið.

Magnus Magnussen og familjan fara avstað í august mánaði, og verða helst aftur at síggja á klettunum tá Smyril er komin til landið í oktober 2004.

# Kunnandi fundur um G!

**Fyrreikararnir fyri G! festivalin skipa í kvøld, mikukvøld fyri kunningarfundi fyri øllum áhugaum. Kunningarfundurin snýr seg um stóra festivalin, sum verður í Gøtu í juli mánaði**

FESTIVALUR
*Ingrid Bjarnastein*

**Gøta:** Í sambandi við, at G! festivalurin verður hildin í Gøtu tann 18. og 19. juli bjóða fyrireikararnir borgarunum í kommununi og øllum øðrum áhugaðum til kunnandi fund í Losjuni í Gøtu kl. 19 í kvøld.

Fyriskipararnir fara at greiða frá, hvat festivalurin hevur á skránni og hvussu tiltakið fer at seta dám á Gøtu bygd.

Festivalurin var á fyrsta sinni á skránni í fjør og bygdarfólki tók sera væl undir við tiltakinum. Veðrið var eisini ógvuliga gott hetta kvøldið, og festivalurin eydnaðist væl á Gøtusandi.

Í ár er festivalurin størri í vavi og fer væntandi at draga nógv fólk til bygdina. Bæði útlendingar, fjølmiðlar, føroyskir festival gestir og onnur fara at leita sær til Gøtu.

Fyrireikararnir síggja G! festivalin sum eina avbjóðing bæði fyri teir sjálvar og fyri onnur, sum eru við í tiltakinum, og er hetta orsøkin til fundin, sum verður hildin í kvøld.

– Bjóðað verður inn til fundar fyri at hoyra, hvussu fólk í økinum kundu hugsað sær at tikið lut. Listin av hjálparfólkum er stórur og fyriskipararnir ynskja at bjóða teimum við, ið hava stundir og hug at taka lut og hjálpa til einhvørjum, siga fyrireikararnir í tíðindaskrivi.

Á G!festivalinum verða nógv spennandi nøvn. Høvuðsnavnið er uttan iva Bomfunk MC´s úr Finlandi, men onnur spennandi nøvn, sum eitt nú K-SYSTEM, Úlpa, Glorybox, Eivør, Clickhaze, Hanus G. Johansen, Enekk og onnur verða á skránni.




*Fyrireikararnir av G! festivalinum bjóða nú øllum til kunnandi fund í Losjuni í Gøtu. Hann verður hildin í kvøld, mikukvøld*

# Spennandi mentanarkvøld í Eysturoynni



*Nú verða Føroyakvøldini aftur á skránni. Tað fyrsta verður á skránni nú leygarkvøldið í Kappróðrarneystinum á Glyvrum*

**Ferðavinnan í Eysturoynni hevði so góðar royndir av mentanarkvøldunum í fjør, at hon hevur gjørt av at aftur bjóða hesi spennandi mentanarkvøldini fram**

FERÐAVINNA
*Ingrid Bjarnastein*

**Eysturoy:** Ferðavinnan í Eysturoynni skipaði í fjør fyri níggju mentanarkvøldum í Eysturoynni. Fýra av teimum vóru hildin í Skótamiðdeplinum á Selatrað, eitt í bygdasalinum á Skála og fýra í Kappróðrarneystinum á Glyvrum.

Í vetur metti ferðavinnan í oynni, at mentanarkvøldini vóru so væl eydnað, at strembað eftir at fáa tiltøkini uppaftur betri enn í fjør.

Innihaldið á teimum ymsu kvøldunum var ymiskt. Tó var felags fyri øll kvøldini, at borðreitt var við føroyskum mati til gestirnar. Harumframt varð skipað fyri upplestri, sangi og framførslu av einum ella hvørjum slagi. Og eitt av hæddarpunktunum var eisini føroyski dansurin.

Tá mentanarkvøldini vóru á Glyvrum kundu gestirnir eisini royna at rógva kapp, og vísti tað seg, at hetta var serstakliga væl umtókt.

**Aftur í ár**

Av tí at kvøldini í fjør vóru so væl umtókt, hevur ferðavinnan í Eysturoynni gjørt av at taka táttin uppaftur í ár. Undir heitinum »Føroyakvøld« fer tað fyrsta av bakkastokki longu nú leygarkvøldið í Kappróðrarneystinum á Glyvrum.

Enn er ikki fastlagt nær og hvar hini Føroyakvøldini verða, tí tey verða fyriskipað eftir áheitan.

Men á Selatrað, Skála, Norðskála, í Fuglafirði, á Kambsdali, í Norðagøtu og á Glyvrum, hava tey víst áhuga fyri at hava Føroyakvøldini. Og kvøldini eru ætlað bæði útlendingum og føroyingum.

Tað fyrsta kvøldið verður nú leygarkvøldið á Glyvrum. Sum vanligt verður borðreitt við alskyns føroyskum mati. Ymiskt undirhald verður á skránni. Millum annað upplesnaður um føroyska samfelagið, søgu og mentan, og eisini verður ein filmur um Føroyar vístur. Kvøldið endar við eini dansiframførslu við dansifelagnum Látrinum á Eiði, har gestirnir eisini sleppa at royna stev.

Til ber at keypa atgongumerki fyri 300 krónur í Kunningarstovuni í Runavík og á Sjómansheiminum. Til ber eisini at bíleggja atgongumerki í Kunningarstovuni í Fuglafirði. Føroyakvøldið byrjar klokkan 19.



# Veteranar leita eftir rækjum

**Fimm av yvirmonnunum á Polar Amaroq eru føroyingar, og teir flestu hava verið leingi í Grønlandi**

RÆKJUVEIÐA
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*




*Fremst frá vinstru Óli Horn, yvirstýrimaður úr Havn og Marner Egholm, maskinstjóri úr Vestmanna. Aftast frá vinstru Sakaris Bech, skipari úr Havn, Pauli Zachariassen, 1. meistari úr Vestmanna og Eivind Olsen, 2. meistari úr Vestmanna*

*Mynd: Jústinus Leivsson Eidesgaard*

**Sosialurin Nuuk:** Í næst0-seinastu viku kom Polar Amaroq á Nuuk við hálvum skipi av rækjum. Teir brutu túrin av, tí góðskan av rækjunum var so vánalig í løtuni. Teir fiska beint uttan fyri Nuuk, so tað er bara ein løta at sigla inn. Menninir síggja troyttir út, teir hava fiskað í Vesturgrønlandi seinastu vikurnar og nú fara teir at gera eina roynd í Eysturgrønlandi, hóast hetta er slett ikki vanlig tíð at fiska rækjur har. Fimm av yvirmonnunum á Polar Amaroq eru føroyingar, og teir flestu hava verið leingi í Grønlandi.

– Rækjurnar eru bleytar nú, tær eru smáa eisini og skifta skel, og tí hevur reiðaríið sent okkum til Eysturgrønlands sum eina roynd at vita, um vit ikki fáa betri slag har, sigur Sakaris Bech, skipari í Havn. Eisini hann verður plágaður av sterka ljósinum um summarið í Grønlandi og hann sitir í sólbrillum og prátar. Forrestin, sólbrillur, tað er ein vani, fer tú fyrst at ganga við teimum, so gongur tú altíð við teimum. Eg kenni onkrar, sum gloyma at taka tær av um kvøldið, fortelir ein annar mær, tá vit tosa um sólbrillur.

– Vit hava frætt frá góðum rækjum í Eysturgrønlandi, so nú skal tað standa sína roynd, vit fara avstað so skjótt sum vit eru lidnir at landa, og tað tekur fýra dagar at sigla, sigur Sakaris Bech.

**Djúp rækjukreppa**

– Tað stendur einki til í rækjuvinnuni. Tað er tætt við, at tað loysir seg ikki at royna, hóast nógv er til. Vit fáa í meðal eini 11 krónur fyri kiloið fyri rárækjur, onkuntíð minni. Fyri kókaðar rækjur fáa vit kanska 14 krónur fyri kiloið, í áttatiárunum var prísurin langt uppi í tjúgunum, heilt upp til 28 krónur fyri kiloið, so her er stórur munur, sigur Sakaris Bech.

– Grønlendsku politikkararnir hava sagt, at vit skulu fiska okkum burtur úr kreppuni. Tað vísir seg at nú koma eftirvirkningarnir av hesum politikki við metlágum prísum. Tað kann vera, at skipini í ár hava sama umsetning sum í fjør, men tað verður bara fiskað so nógv meira, og talan er um eina ónda ringrás, tí fleiri rækjur koma á marknaðin, meira fellir prísurin, sigur Sakaris Bech.

**Veteranur**

Sakaris Bech úr Havn hevur siglt í 27 ár í Grønlandi, hann byrjaði á dekkinum vid Hvítanes og er nú skipari. Vit sita í skiparakamarinum og práta, allir fimm føroyingarnir saman og síðan eg. Skipavitjanin byrjaði hjá maskinstjóranum Marner Egholm úr Vestmanna, og nú eru allir samlaðir inni hjá skiparanum. Um eina løtu skulu vit út at taka eina mynd av manningini.

– Eg kundi gott onkuntíð hugsað mær at skift til annað starv heima. Men tað er nokk ikki so lætt at finna eitt starv í mínum aldri, og eg dugi ikki við tímaløn. Tó havi eg betri hug at vera heima nú, enn tá eg var yngri.

Og tað er ikki bara Sakaris, sum er veteranur í Grønlandi, teir flestu eg havi hitt hesa vikuna, eg havi verið í Nuuk, eiga fleiri ár á baki í Grønlandi.

Framman fyri mær situr stýrimaðurin Óli Horn úr Havn. Hann kom fyrstu ferð til Grønlands við Hvítanes í 1977 og hann hevur ikki gjørt annað enn at troyta grønlendsku grunnarnar. Og so eru eisini tríggir vestmenningar inni í skiparakamarinum og teir eru allir partur av yvirmonnunum umborð á Polar Amaroq hjá Polar Seafood. Amaroq merkir á grønlendskum revur ella úlvur. Teir eru ikki heilt vísir, men okkurt sovorit.

Marner Egholm, maskinstjórin hevur sigt í samfull 12 ár í Grønlandi, hann kann tosa við um grønlendsk viðurskiftir, men tað verður lítið hár eftir á høvdinum, tá hann hevur verið so leingi sum skiparin.

Eisini Pauli Zachariassen, sum er 1. meistari við hevur verið nógv ár í Grønlandi, hann kom yvir í 1993 og hevur sostatt verið 10 ár í grønlendskari tænastu.

Tann einasti, sum slett ikki kann tosa við um fiskiskap undir Grønlandi er 2. meistarin, Eivind Olsen úr Vestmanna. Hann hevur bara verið tríggjar mánaðar tilsamans í Grønlandi og tað fær hann fleiri ferðir at vita frá hinum erfarnu, meðan vit práta.

Men umborð í skipi er ringt at halda nakað met leingi, tí onkur skal altíð vera best, og meðan vit práta so kemur ein í tankar um, at Anfinn Ryggstein, var heili 50 ár í Grønlandi og tá eitt slíkt tal kemur á borðið og tað kom ikki frá skiparanum, so líkasum fána hini frammanfyri nevndu áramál burtur, og sjálvt 2. meistarin fær uppreisn, takkað verið Anfinni

**Tveir mánaðar burtur**

Teir fimm føroyingarnir eru væl nøgdir við skipanina at vera tveir mánaðar burtur og tveir mánaðar heima.

– Tó er tað rættuliga strúggið, vit eru til arbeiðis frá tí vit fara og til vit koma heim aftur. Vit ganga seks og seks, og eg sovi tvær reisur um dagin. Fimm tímar um náttina og tveir seinnapart. Eg kundi ikki hugsað mær at verið ein mánað heima og ein burtur. Tað er eisini strævið, tí tú brúkar nakrar dagar at fella til í báðum støðum, sigur Sakaris Bech

– Eg haldi hetta er ein fín skipan og eg veit bæði frá mær sjálvum og hinum, sum eru við, at vit blíva súrir, um tíðin blívur longri enn tveir mánaðar. Eg kann í hvussu er siga fyri meg, at eg seti størri krøv til arbeiðið nú, enn tá eg var yngri. Fyrst eg fór til Grønlands, so spurdi eg ikki eingang um løn, eg skuldi bara avstað, tí eg havi ongantíð interesserað meg fyri nøkrum øðrum enn at vera á sjónum. Átti eg so fyri eina motorsúkklu, tá eg kom heimaftur, so var eg nøgdur. Í dag skal eg hava at vita akkurát hvordan og hvorledes, ella hevði eg slett ikki farið, sigur Sakaris Bech.

*email: justinuseidesgaard@hotmail.com*

# Grønlendingar vilja ikki hava ábyrgd

**Yvir 100 føroyingar sigla sum yvirmenn við stóru grønlendsku trolarunum, meðan grønlendingarnir halda seg á brúnni**

RÆKJUVEIÐA
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

**Sosialurin, Nuuk:** Tað er ikki gravgangur hjá grønlendingum eftir at manna yvirmannapostarnar umborð á teimum mongu stóru stásiligu fiskiførunum, sum teir eiga. Av teimum fýra skipunum undirritaði vitjaði í Nuuk í seinastu viku var ikki ein tann einasti grønlendingur yvirmaður. Teir halda til á dekkinum.

– Grønlendingar eru dugnaligir menn, men teir hava einki í móti at vera á dekkinum. Teirra karriera steðgar oftast við 2. stýrimanni, so vilja teir ikki meira. Tað eru nógvir grønlendingar, sum hava pappírini at standa á eini brúgv, men teir hava ein heilt annan holdning til ábyrgd, sigur Sakaris Bech, skipari á Polar Amaroq.

– Eg havi ikki nøkur neyv tøl yvir, hvussu tað fyriheldur seg við býtinum av yvirmonnum millum grønlendingar og føroyingar, men í hvussu er á teimum stóru trolarunum eru yvir 50, kanska 75 prosent av yvirmonnunum føroyingar. Tað sigla yvir 100 føroyingar sum yvirmenn á grønlendskum skipum. Nakrir grønlendingar eru á brúnni, men so at siga ongin er í maskinrúmunum á teimum størru fiskiførunum, sigur Sakaris Bech.

Og tað eru ikki bara yvirmenninir, sum er føroyingar. So at siga allir stóru grønlendsku rækjutrolararnir brúka lemmar frá Injectdoor úr Vági og nógv trol koma frá Vónini.

Føroyingar hava enn fótin fastan í Grønlandi.



*Sakaris Bech er skipari á Polar Amaroq*

*Mynd: Jústinus Leivsson Eidesgaard*